# 220.000 ferðafólk í Billund

**Øskuskýggið, sum rakti altjóða flogferðsluna í fjør, sæst væl aftur í virkseminum á flogvøllinum í Billund. Hetta kann tó ikki reingja tann veruleika, at fyri Vesturjútland hevur hesin flogvøllurin framvegis sera stóran týdning.**



**ØKING**

*Flogvøllurin í Billund er í støðugum vøkstri, og við nýggjum rutum sær ljóst út fyri framman*

Nýggjastu tølini fyri flogferðsluna í apríl mánað í ár vísa, at so mong sum 4.255 flogfør komu og fóru hagani. Av hesum vóru 588 flogfør ið fóru á charter-ferð við omanfyri 60.000 ferðafólkum.

Talið av ferðafólkum lá annars um tey 220.000. Av hesum fóru 145.000 uttanlands, og helst eisini fleiri teirra til Føroyar.

Nevnast kann, at í summar fer Atlantsflog at flúgva higar sjey ferðir um vikuna, og tí er ikki óhugsandi at uppaftur fleiri føroyingar fara at brúka flogvøllin í Billund.

## Tann besti

Stjórin á Billund-flogvøllinum, Kjeld Zacho Jørgensen fegnast sum vera man um stóra talið av ferðafólkum í apríl mánaði.

Hann vísir m.a. á, at apríl mánaður var tann besti í søguni hjá flogvøllinum. Næstbesti mánaðurin var í 2008, tá 188.000 fólk fóru um flogvøllin. Í ár vóru tey altso 32.000 fleiri.

Haraftrat hevur franska flogfelagið Air France sett tríggjar fráferðir á skrá í apríl, og at ein stórur vøkstur hevur verið á rutuni til Frankfurt.

Tey flestu ferðafólkini ferðast kortini til London, Amsterdam og Frankfurt.

- Vit hava tí góðar vónir fyri framtíðina, sigur Kjeld Zacho Jørgensen.

Vert er eisini at leggja merki til, at fyri charter-ferðsluna liggur Antalya á odda, og í hølunum á tí Las Palmas, Tenerife og Palma de Mallorca.

